# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Gott enskt UEFA-kvøld

**Manchester City og Tottenham vunnu. Portsmouth fekk javnleik ímóti AC Milan, men burdi vunnið.**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tað hevur verið ein langur vegur hjá Manchester City til UEFA Cup bólkaspælið. Men sigursferðin hjá teimum ljósabláu í UEFA Cup kappingini, sum byrjaði ímóti EB/Streymi heldur fram í bólkaspælinum. Manchester City var í Gelchenkirchen í Týsklandi og spældi ímóti Schalke04. Og City vann ein góðan 2-0 sigur, aftaná hálvleiksstøðuna 1-0. Benjani Mwaruwari legði City á odda í 33 minutti. Tá 67 minuttir vóru spældir staðfesti Stephen Ireland sigurin. City er nú odda í bólki A við 6 stigum fyri 2 dystir.

## Spurs og Pompey

Við einum útisigri uppá 1-0 ímóti hollendska liðnum, NEC eydnaðist eisini Tottenham at leggja seg á odda í sínum bólki. Tottenham spældi serliga væl í 1. hálvleiki, og sigursmálið fall, tá eitt lítið korter varð farið av dystinum. Frazier Campell stútaði bóltin á yvirleggjaran, men Jamie O´Hara varð beinavegin á staðnum, og beindi returbóltin í netið til 1-0. Í bólki E hevði Portsmouth hevði ein heimasigur ímóti AC Milan í pottinum. Teir førdu 2-0 ímóti italska stórfelagnum, til 6 minuttir vóru eftir av dystinum. Kaboul og Kanu høvdu lagt Pompey á odda. Tá 6 minuttir vóru eftir vísti Ronaldinho góðar, gamlar dygdir og minkaði um munin til 2-1. Tveir minuttir inni í tíðini, sum dómarin hevði lagt aftrat, eydnaðist tað Filippo Inzaghi at javna til 2-2. Milan hevur 7 stig fyri 3 dystir. Portsmouth hevur 1 stig fyri 2 dystir.

## Norðurlendska uppgerðin nærkast

Norsku Rosenborg taptu stórt í bólki G, 0-4 ímóti sponsku Valencia í Tróndheimi. Juan Mata legði Valencia á odda aftaná 21 minuttir. Í 2. hálvleiki øktu Pablo, Rubén Baraja og Joaquin. Rosenborg hevur ikki heilt tær somu dygdirnar, sum teir vístu í Champions League kappingini báðumegin aldarskiftið. Valencia hevur nú 4 stig fyri 2 dystir. Rosenborg hevur bara eitt stig aftaná 3 dystir. Komandi dystur er ímóti FC Keypmannhavn í Parkini. FC Keypmannahavn hevur eisini bara eitt stig, men fyri 2 dystir. Tá so FCK eisini hevur heimavøll, og norska kappingin hevur ligið still í nakrar vikur nú, so má FCK taka á seg leiklutin, sum favorittur ímóti gamla norska stórliðnum.

## Laudrup vann

Í bólki D, bólkinum hjá Tottenham og Udinese er liðið, sum Michael Laudrup venur, Spartak Moskva eisini at finna. Spartak varð á vitjan hjá Dinamo Zagreb, og eydnaðist tað Laudrup og hansara monnum at fáa øll trý stigini við Aeroflot-flogfarinum aftur til Moskva.

Tá 75 minuttir vóru farnir av dystinum megnaði verjan hjá Dinamo Zagreb ikki at beina bóltin burtur. Hetta gagnnýtti Ivan Saenko, og skamt frá brotsteigarmarkinum beindi hann bóltin í netið til 1-0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið av dystinum. Spartak Moskva hevur nú 3 stig fyri 2 dystir. Komandi umfar hevur Spartak heimadyst í moskovitiska kuldanum ímóti hollendsku NEC, sum einki stig hava fingið á kontuna hjá sær. Tá fer at liggja ræðið fyri hjá Laudrup og hansara monnum. Seinast á skránni hjá Spartak er ein túrur til White Hart Lane at spæla ímóti Tottenham.

Í bólki F sat Aston Villa yvir. Har varð dystur í Hamburg millum HSV og Ajax Amsterdam. Leingi lá í luftini, at dysturin skuldi enda 0-0, men tá 77 minuttir vóru farnir legði Leonardo á odda 1-0, ein støða sum helt til endan. Aston Villa hevur 6 stig fyri 2 dystir, meðan Ajax hevur 6 stig fyri 3 dystir. Aston Villa hevur heimadyst ímóti Zilina næstu ferð, og kunnu teir tá veruliga tryggja sær víðari luttøku í kappingini.



*Tað eydnaðist Michael Laudrup og Spartak Moskva at vinna útidystin móti Dynamo Zagreb. Her dystast Sergei Parshivlyuk úr Spartak við Luis Ibanez hjá heimaliðnum*

Mynd: Polfoto/AP

# Italia fekk javnleik ímóti Bosnia

Tað er nú ivaleyst, at uppgávan á Sicilia sunnudagin verður ríkiliga stór. Italia fekk sítt fyrsta stig á heimavølli í Siracusa í kvøld. Mótstøðuliðið varð Bosnia, sum Føroyar taptu 28-45 ímóti í farna mánað. Dysturin millum Italia og Bosnia ígjár endaði við javnleiki 25-25. Hálvleiksstøðan varð 10-9 til Italia.

Italia skuldi annars verið tað liðið, sum Føroyar skuldu havt frægast møguleika at staðið seg ímóti, men nú vita vit so, at mótstøðan verður ríkiliga stór, tá Italia og Føroyar møtast á Sicilia, komandi sunnudag klokkan 18. Sjónvarp Føroya sendir dystin beinleiðis.

**-mørk**

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 7 | 7 | - | 0 | 21 | 8 | 13 | 14 |
| 2 Dráttur | 7 | 5 | - | 2 | 17 | 11 | 6 | 10 |
| 3 Mjølnir | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 4 Fleyr | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 12 | 2 | 8 |
| 5 ÍF | 7 | 3 | - | 4 | 13 | 13 | 0 | 6 |
| 6 KÍF | 7 | 1 | - | 6 | 10 | 18 | -8 | 2 |
| 7 TB | 6 | 0 | - | 6 | 1 | 18 | -17 | 0 |

# Klaksvík National

**Um vikuskiftið verður stór svimjikapping í Klaksvík, har kappast verður á stytru teinunum**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Klaksvík National, sum kappingin eitur, riggaði somikið væl í fjør, at fyrireikararnir ongan tíð vóru í minsta iva um, at hetta skuldi endurtakast.

Fyrst og fremst, so er stórur dentur lagdur á undirhaldsvirðið í kappingini. Disko-rútmur og ljósshow skulu fáa áskoðararnar í rætta lagið, og við einvíst at kappast á stytru teinunum, verður talan ongan tíð um nakrar langdrignar løtur við hylin.

Kappingarnar fara fram á 50 og 100 metrum – umframt liðsvimjing – og eru tað svimjarar í bólkunum 2, 1 og junior, sum eru bodnir við til kappingina.

Á 50 metrum sleppa seks svimjarar úr hvørjum bólki í finalurnar, og á 100 metrum verður feltið skorið niður til tveir riðlar, sum kappast leygarmorgunin.

Byrjað verður leygarmorgunin klokkan 9, og verður so svomið til klokkan 12.30. Klokkan 17.30 byrja finalurnar, og verður kappingin væntandi liðug um hálvgumníggju-tíðina.

Heldur enn at fáa heiðursmerki fáa fremstu svimjararnir gávukort. Tann leisturin varð royndur í fjør, og riggaði hetta sera væl, skilst.

---

**Dystir um vikuskiftið**

**Flogbóltur**
Eik-ligan, kvinnur
29.11 14.00 SÍ-KÍF
29.11 14.00 Dráttur-ÍF
30.11 14.20 TB-Fleyr